## Grønland má tátta í

Politikararnir í Grønlandi kunnu ikki halda fram við verandi fíggjarpolitikki, um teir skulu gera sær nakrar vónir um at varðveita verandi vælferðarstøði, eftir at sjálvsstýrislógin er komin í gildi. Tað stendur at les aí einari frágreiðing, sum landsstýrið almannakunngjørdi um vikuskiftið. Víst verður á, at trý tey seinastu árini hevur landskassin havt næstan 900 milliónir krónur í halli, og tí má tað Landstingið, sum verður valt á valinum tann 2. juni, leggja á annan bógv, sigur KNR. Umframt sparingar mælir frágreiðingin til at endurútbúgva fólk til nýggjar vinnur fyri at økja tær almennu inntøkurnar.



## Løkke hevði vunnið

Um tað er Lars Løkke Rasmussen, sum ger munin, skal verða ósagt, men í hvussu er hevði stjórn hansara verið sitandi, um fólkatingsval var nú. Fyri bara 14 døgum síðani vísti ein tilsvarandi kanning tað øvugta. Tann nýggja kanningin sigur, at var val til Fólkatingið ný, høvdu stjórnarflokkarnir og Danski Fólkaflokkurin fingið 89 umboð, og andstøðan hevði fingið 86. Í kanningini fyri 14 døgum síðani fingu partarnir ávikavist 84 og 91 umboð. Munurin á kanningunum er, at í teirri seinnu missir Sosialistiski Fólkaflokkurin, meðan Tey Konservativu fáa meiri enn í teirri fyrru kanningini.

# Kemur ikki ofta fyri

**John Danielsen, fíggjarstjóri hjá SEV, sigur, at út av 23.000 brúkarum verður færri enn ein stuldur staðfestur um árið**

STREYMSTULDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Tað kemur fyri, men tað er tíbetur sjáldan.

Tað sigur John Danielsen, fíggjarstjóri hjá SEV, nú elfelagsskapurin júst hevur verið í Føroya Rætti við einum manni, sum er ákærdur fyri at hava stolið streym.

Onkuntíð kemur tað fyri av ósketni, at onkur installatørur ger onkran feil, men tað kemur eisini fyri, at fólk við vilja nápa streym frá SEV. Sum í hesum døminum, har ein maður hevur stungið ein pinn inn í máларan fyri at fáa hann at mala spakuligari.

- Tað kemur tíverri fyri, at fólk snýta SEV fyri streym, men tá vit hava 23.000 brúkarar, og vit hava minni enn ein tilburð av slíkum slagi um árið, meta vit ikki, at talan er um nakran stóran trupulleika, sigur John Danielsen.



*Stuldur av streymi er eingin stórur trupulleiki, sigur John Danielsen, fíggjarstjóri hjá SEV*

SEV hevur eina deild, sum tekur sær av eftirliti við kundunum, og varnast teir nakað óvanligt ella ólógligt, verður løgreglan fráboðað.

Eitt annað, sum fer at gera tað lættari hjá SEV at hava eftirlit við nýtsluni hjá kundunum, er uppsetanin av nýggju fjaravlesingar málarunum.

- Við hesum málarunum ber til at hava eyga við nýtsluni hvønn dag ella enntá hvønn tíma. Vit hava higartil sett góðar 3.000 fjaravlestrar málarar upp, og málið hjá okkum er at vera komnir á mál um tíggju ár, sigur John Danielsen.

Fjaravlesarar verða settir upp í allar nýggjar installatiónir eins og øll virkir hava fingið nýggju málararnar.

- Annars verða teir settir upp í økjum í senn. Vanliga verður ein transformatorstøð tikin, og allar installatiónir knýttar at hesi fáa so nýggju málararnar, sigur John Danielsen.

### Melda altíð

Tað er sjálvandi nógv um at fara, tá talan er um 23.000 nýggjar málarar, og verður roknað við, at teir halda í 15-20 ár, skulu 1500 málarar skiftast um árið bert fyri at vera up to date.

Tað verður sum nevnt lættari hjá SEV at fylgja við, tá nýggju málararnir eru farnir at virka, og tí fer eisini at bera betur til at síggja, um nakað óvanligt er við nýtsluni.

Tað finnast ymsir mátar at svika við nýtsluni, og hesin, sum maðurin varð dragsaður í rættin fyri í síðstu viku, er so ein kendur máti.

Annars høvdu teir eina stóra sak fyri nøkrum árum síðani, har ein maður hevði »by-passað« málaran, og hita heili tvey sethús upp við stolnum streymi.

Men tað varð so uppdagað, og tann maðurin varð eisini drigin fyri rættin.

- Tað er so, at vit altíð melda slík mál til løgregluna. Tað er jú ein borgaraskylda at melda, tá nakað ólógligt fer fram, og vit ganga altíð tann vegin, tá vit koma fram á stuldur av streymi, sigur John Danielsen, fíggjarstjóri hjá SEV.

# Ternan skjót og góð loysn

**Um páskahøgtíðina hevur Strandferðslan gjørt royndir við at flyta skip runt á ymsu farleiðunum. Um eina viku ella so eru eftirmetingar gjørdar, men Bogi Mortensen, stjóri, heldur, at Ternan hevði verið ein skjót og góð loysn á Nólsoyarfarleiðini**

RUTUSAMBAND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Við ávísum ábøtum hevði væl borið til at sett Ternuna inn í siglingina um Nólsoyarfjørð.

Tað sigur Bogi Mortensen, stjóri hjá Strandfaraskipum Landsins.

SSL hevur seinastu vikurnar havt Rituna siglandi á Svínoyarleiðini, Ternan hevur røkt Kallsoyarsiglingina, meðan Sam hevur siglt um Nólsoyarfjørð.



*Ternan hevur áður siglt upp á Nólsoy, nevniliga á Ovastevnu*

Mynd: Álvur Haraldsen

- Enn er eingin avgerð tikin um nakað. Fyrst skulu vit eftirmeta hesar royndirnar, og saman við skiparunum fara vit at evaluera hesar royndirnar fyrst í komandi viku, sigur Bogi Mortensen.

Hesar royndirnar eru gjørdar fyri at loysa upp fyri málinum.

- Neyðugt verður við ávísum justeringum fyri at fáa Ternuna tíðarhóskandi. Eitt nú má ein lyfta setast í skipið, so rørslutarnað sleppa upp í salongina, sigur Bogi Mortensen.

Eisini skal skipið sandblásast, áðrenn tað verður sett í eina møguliga sigling á Nólsoyarleiðini. Eisini aðrar smávegis justeringar mugu gerast.

- Skjótasta loysnin á Nólsoyarleiðini er Ternan. Vit hava eisini sett eitt krónutal á, hvat hesar justeringar fara at kosta, so fáa vit eina ábending frá nólsoyingum og eina játtan frá landinum, kundi hendan ætlan skjótt verið sett í verk, sigur Bogi Mortensen.

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at tá eftirmetingarnar eru gjørdar kundi verið áhugavert við einum fundi við Nólsoyarnevndina um siglingina.

Neyðugt verður undir øllum umstøðum at gera eitthvørt við atløguviðurskiftini í Nólsoy, tí uttan mun til, um talan verður um eitt nýtt skip, ella Ternan verður fyribils loysnin, má okkurt slag av ferjulegu gerast. Og sum skilst eigur landið framman undan eina rampu, sum ikki verður brúkt.